## Nenad Stankovic til B68



Nenad Stankovic skal í komandi kappingarári spæla við B68. Tað skrivar heimasíðan hjá toftamonnum. Serbiski miðvallarin kom til Føroya í 2005, tá hann umboðaði Skála. Saman við venjaranum Johan Nielsen skifti hann til NSÍ í 2007, har hann átti ein høvuðsleiklut í føroyameistaraheitinum hjá runavíkingum. Hann var sama árið valdur sum ársins leikari í føroyskum fótbólti. Nú skal Nenad Stankovic royna seg hjá grannunum á Toftum, har hann helst skal loysa av Jann Inga Petersen, sum fyrr í vetur gjørdi avtalu við júst NSÍ.

## Calderón liðugur í Madrid

Sambært sponskum miðlum eru dagarnir hjá Ramón Calderón sum forseti í Real Madrid taldir. Eitt nú eru ógvusligar ákærur um valsvik við seinasta aðalfundin hjá felagnum, og Marca skrivar nú, at Calderón tekur seg aftur sum forseta í næstum. Sambært blaðnum, sum plagar at vita, hvat gongur fyri seg í kongaliga felagnum, verður núverandi varaforsetin, Vicenta Boluda, nýggjur forseti í Real Madrid.

# Nú er trýst á Neistanum

**Eftir at teir fyri bara tveimum vikum síðani mistu oddasessin, er Neistin nú í vanda fyri at missa annaðplássið og harvið finalusessin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá farið varð inn í 2009, var lagið í mansleguni hjá Neistanum mest sum í toppi. Formkurvan hjá liðnum hevði peikað beint uppeftir, og við einum sigri á VÍF kundi liðið seta beina kós móti FM-finaluni.

Síðani hevur korthúsið tó ikki staðið serliga stútt. Dysturin móti VÍF varð taptur. Tað sama hendi á Skála fyri viku síðani, og eftir tapið móti KÍF í miðvikuni er Neistin í vanda fyri at missa eina møguliga steypafinalu úr hondum.

Tí er trýstið stórt, nú VÍF aftur er á vitjan í Havn, og talan er væl at merkja um eitt VÍF-lið, sum tykist nærkast toppinum aftur, eftir at teir fyri jól vóru í einum aldudali.

Vinna vestmenningarnir eisini hendan dystin, kunnu teir mest sum bíleggja sær frídagar, tá FM-finalurnar koma á skránna í vár.



*Síðani VÍF fyri tveimum vikum síðani vann á Neistanum, hava vestmenningar bókstaviliga koyrt í gulu førararatroyggjuni. Sunnudagin vitja teir aftur í Havn*

### Kyndil órógvar

Í Hoyvíkarhøllini hava hoyvíkingar møguleika at prógva, at tapið móti Kyndli herfyri var eitt mistak, tá teir aftur hava heimavøll móti grannunum.

Seinastu vikurnar hava tó prógvað, at dystirnir móti Kyndli eru alt annað enn lættir, og kunnu teir grønu aftur vinna sær stig hesaferð, verður brádliga slettis ikki so langt til eitt møguligt finalupláss, sum tað annars hevur verið. Og við fullari skjáttu av sjálvsáliti eftir fýra sigrar á rað er als ikki óhugsandi, at Kyndil fer at órógva hini liðini nakað meira, enn hesi hava ætlað.

Seinasti dysturin hetta umfarið er millum KÍF og StÍF. Strandingar eru enn við í kapprenningini um eitt pláss í FM-finaluni, men avrikið hóskvøldið gav ikki nakran serliga góðan gróðrarbotn fyri vónum av hesum slag. Og tí skulu heilt aðrir bollar í súpanina, um teir framvegis vilja vera partur av tí stríðnum.

## Greiðir favorittar

Talan tykist ikki at vera um tann heilt stóra spenningin í teimum trimum kvinnudystunum, sum verða spældir um vikuskiftið.

Skal metast eftir úrslitunum, sum higar til hava verið í landskappingini, so kann Neistin kanska gera okkurt við Stjørnuna, sum fyrr í vetur mátti taka til takkar við javnleiki í útidystinum móti Neistanum. Men úrslitið í Klaksvík í gjár bendir tó ikki á, at Neistin skal vænta sær nakað serligt hendan dystin.

Tjaldur hevur heimavøll móti StÍF, sum neyvan fer at gera tað heilt stóra í júst tí dystinum, og tað sama má sigast um Kyndil, sum hevur møtumikla uppgávu í Vági.

-mørk

## Leikskráin í teimum 4 HM-bólkunum

**Bólkur A spælir í Osijek**
17/1 kl. 15.30: Slovakia - Argentina
17/1 kl. 17.30: Ungarn - Australia
17/1 kl. 19.30: Frakland - Rumenia
18/1 kl. 14.00: Australia - Slovakia
18/1 kl. 16.00: Rumenia - Ungarn
18/1 kl. 18.00: Argentina - Frakland
19/1 kl. 14.30: Rumenia - Argentina
19/1 kl. 16.30: Ungarn - Slovakia
19/1 kl. 18.30: Frakland - Australia
21/1 kl. 14.00: Australia - Rumenia
21/1 kl. 16.00: Ungarn - Argentina
21/1 kl. 19.00: Slovakia - Frakland
22/1 kl. 14.00: Argentina - Australia
22/1 kl. 16.00: Slovakia - Rumenia
22/1 kl. 18.00: Frakland - Ungarn

**Bólkur B spælir í Split**
16/1 kl. 19.30: Kroatia - Suðurkorea
17/1 kl. 15.30: Spania - Kuwait
17/1 kl. 17.30: Svøríki - Kuba
18/1 kl. 15.30: Kuba - Spania
18/1 kl. 17.30: Suðurkorea - Svøríki
18/1 kl. 19.30: Kuwait - Kroatia
19/1 kl. 15.30: Suðurkorea - Kuwait
19/1 kl. 17.30: Svøríki - Spania
19/1 kl. 19.30: Kroatia - Kuba
21/1 kl. 15.30: Kuba - Suðurkorea
21/1 kl. 17.30: Svøríki - Kuwait
21/1 kl. 19.30: Spania - Kroatia
22/1 kl. 15.30: Kuwait - Kuba
22/1 kl. 17.30: Spania - Suðurkorea
22/1 kl. 19.30: Kroatia - Svøríki

**Bólkur C spælir í Varazdin**
17/1 kl. 14.30: Pólland - Algeria
17/1 kl. 16.30: Týskland - Russland
17/1 kl. 18.30: Makedonia - Tunesia
18/1 kl. 14.30: Algeria - Makedonia
18/1 kl. 16.30: Tunesia - Týskland
18/1 kl. 18.30: Russland - Pólland
19/1 kl. 14.30: Pólland - Makedonia
19/1 kl. 16.30: Týskland - Algeria
19/1 kl. 18.30: Russland - Tunesia
21/1 kl. 14.30: Algeria - Russland
21/1 kl. 16.30: Makedonia - Týskland
21/1 kl. 18.30: Pólland - Tunesia
22/1 kl. 14.30: Makedonia - Russland
22/1 kl. 16.30: Týskland - Pólland
22/1 kl. 18.30: Tunesia - Algeria

**Bólkur D spælir í Porec**
17/1 kl. 14.15: Noreg - Saudi Arabia
17/1 kl. 16.15: Egyptaland - Serbia
17/1 kl. 18.15: Danmark - Brasilia
18/1 kl. 14.15: Brasilia - Noreg
18/1 kl. 16.15: Saudi Arabia - Egyptaland
18/1 kl. 18.15: Serbia - Danmark
19/1 kl. 15.00: Brasilia - Serbia
19/1 kl. 17.10: Noreg - Egyptaland
19/1 kl. 19.15: Danmark - Saudi Arabia
21/1 kl. 15.00: Saudi Arabia - Brasilia
21/1 kl. 17.10: Noreg - Serbia
21/1 kl. 19.15: Egyptaland - Danmark
22/1 kl. 15.15: Serbia - Saudi Arabia
22/1 kl. 17.15: Egyptaland - Brasilia
22/1 kl. 19.15: Danmark – Noreg

Høvuðsumfarið verður spælt í døgunum 24. til 27. januar. Hálvfinalurnar verða spældar 30. januar. Finalan og bronsufinalan verða spældar sunnudagin 1. februar.

## Ebbe Sand til Føroya

**Fyrrverandi danski landsliðsframherjin, Ebbe Sand, skal í komandi mánað halda skeið fyri føroyskum venjarum**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Fyrrverandi málkongurin í týskum fótbólti, Ebbe Sand, skal í komandi mánaði leggja føroyskum venjarum lag á. Fótbóltssambandið hevur fingið avtalu í lag við danan um at halda impolsskeið, sum lið í at hækka støðið á føroyskum fótbólti. Undirvísingin verður bæði ástøðilig og verklig, og evnið í undirvísingini verður venjing við áleyparum, skrivar heimasíðan hjá FSF. Skeiðið verður 21. februar, og hava ávísir venjarar fingið innbjóðing.